# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Havnar leksikon

## Konfirmantar í Havn 1940

**Í samband við at Birgar Johannessen í Havn savnar tilfar til eitt leksikon yvir Havnina í tíðarskeiðinum 1900-1969, biðja vit um hjálp frá lesarum, sum kenna persónar á myndini, um at siga okkum frá, so "Havnar leksikon" kann verða heilt røtt.**

Hendan myndin er av konfirmantum í Havn 31. mars 1940. Her hava vit øll nøvnini, men mangla at fáa tríggjar persónar upp á pláss. Teir eru: Kornelius Christian Frederik Dam, Lars Aage Knudsen, og Joen Wang Justinussen (Jógvan). Tað vil siga, at har tað stendur »ókendur« (við pílin), skal navnið á einum av hesum trimum persónum setast inn. Tey sum kenna hesar persónar eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 / 273168.



*Aftasta rað f.v.: Jacob Frants Olsen, Peter Arne Rein, Johan Ejler Rubeksen, Daniel Ole Wang Hansen, Ole Oliver Justinussen, Ole Peter Lave Olsen, Mouritz Andreas Hansen, Joen Henrik Petersen, »ókendur« .*

*Miðraðið f.v.: Jacob Joensen provstur, »ókendur«, Haldor Christian Christiansen, Steingrím við Stein, Niels Pauli Justinussen, Ole Bjørn Viðstein, Bergtórur Bærentsen, Hans Jacob Hansen, Kaj Hansen, Ernst Reinert, Johannes Nicolaj Rubeksen, Trygve Árting, »ókendur«.*

*Fremra rað f.v.: Leivur Nielsen, Hjalgrímur Jacobsen, Nólsoy, Svend Karsten Simonsen, Elsebeth Sofie Stephansen, Johanne M. F. Petersen, Glyvrar, Aslaug Dam, Mildrid Dam, Anne Kathrine Højgaard, Hjørdis Thomsen, Nólsoy, Ásla Thomsen, Nólsoy, Birthe Ludvigsen, Erik Ludvigsen, og Eivind Olsen.*

*Marie Jacobine Hansen, sum varð konfirmerað hendan dagin, vantar á myndini.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## Hugin er flutt í nýggj høli og hevur sett nýtt starvsfólk

**Virkisráðgevingarfelagið Hugin er flutt í nýggj skrivstovuhøli á Argjum og hevur sett Maibritt Højgaard sálarfrøðing og MBA í starv**



Higartil hevur Hugin húsast heima hjá einum av stovnarunum, Steinbjørn Hardlei. Nú er ráðgevingarfelagið flutt í nýggj og rúmlig skrivstovuhøli á Argjaboðagøtu 7 á Argjum. Hølini eru í bygninginum hjá el & tele uttast á Argjaboða.

Við hesum hevur Hugin munandi betri arbeiðsumstøður og er enn betur ført fyri at veita viðskiftafólki sínum eina góðskutænastu. Viðskiftafólk, sambond og onnur áhugað er sjálvandi vælkomin at støkka inn á gólvið at heilsa uppá og fáa sær ein kaffimunn.

Hugin hevur um somu tíð sett Maibritt Højgaard í starv sum fríyrkisfólk. Maibritt Højgaard er sálarfrøðingur og hevur MBA frá University of Portsmouth UK. Hon undirvísir í sosial- og organisatiónspsykologi á University of Wales í Swansea og arbeiðir sum konsulentur í Bretlandi, Danmark og Føroyum fyri Hugin.

Maibritt Højgaard hevur tó flestar royndir frá vinnulívinum sum fasilitator og skeiðleiðari. Hon hevur serligan áhuga fyri samskifti í fyritøkum, og hvussu samrøða kann nýtast sum eitt reiðskap at skapa menning og vøkstur. Við hesum spennandi førleikum kann Hugin veita eina enn betri tænastu innan sítt virkisøki.

Kjarnuøkið hjá Hugin er tann strategiska fyritøkumenningin. Tað merkir, at Hugin hjálpir fyritøkum at seta sær yvirskipað mál og umseta hesi til ítøkiligar ætlanir. Málbólkurin er serliga smærri og miðalstórar fyritøkur. Royndirnar vísa, at í hesum fyritøkum eru góðir møguleikar at vinna meira pening við málrættaðari fyritøkumenning.

Meira fæst at vita um Hugin á heimasíðuni www.hugin.fo.

### 90 ár

Í dag, 7. januar fyllir Niklas Olsen, bátabyggjari á Tvøroyri 90 ár.

### Dagurin

**1. januar. Knútur hertogi.** Talan er um sonin hjá danska konginum Erik Ejegod. Hann varð myrdur av systkinabarni sínum Magnusi henda dag í 1131. Í danskari søgu verður hann róptur Knútur Lávardur, ið er sama orðið sum tað enska *lord*, ið merkir harri. Knútur varð skírdur halgimenni í 1169.
Navnið *Knútur* er kanska upprunaliga norrønt og merkir júst *knútur*, brúktur sum eyknevni. Ella kanska er tað gamalt týskt navn: *hin (hug)djarvi.*

Sosialurin
Sosialurin
i